*Føroysku áskoðararnir settu sín avgjørda dám á kvøldið. Hæddarpunktið var, tá teir sungu tjóðsangin fyri einari tigandi heimafjøld. Á skeltinum niðanfyri føroysku sektiónina sæst, hvat týskarar hildu um avrikið hjá heimaliðnum*






*Talan var um eina framúrskarandi framførslu, tá Rúni Brattaberg undan dystinum sang føroyska tjóðsangin – og tá føroysku áskoðararnir seint í dystinum gjørdu eina endurtøku, hoyrdist einki annað á Niedersachsenstadion*

*Framhald av síðu 21*

longu fingið sjón fyri søgn, at tað kundi loysa seg at trýsta týskararnar, og tað hildu teir áfram við. Og so vóru teir eisini kaldir. Tá týskarar royndu at seta ferð á, varð spælið alla tíðina pilkað niður við lítlum fríspørkum, sum oyðiløgdu rútmuna í spælinum, og sum minuttirnir gingu, gjørdust týsku frustratiónirnar alt meira sjónligar.

Helst mundi týski venjarin, Rudi Völler, ikki vera heilt álvuligur við støðuna. Eitt var, at hann alla tiðina sást veipa og geyla at spælarum sínum, men hann sendi eisini Oliver Neuville at hita upp. Hann var annars ivasamur undan dystinum, tí hann hevði ein minni skaða, og tað varð sagt undan dystinum, at hann bert skuldi nýtast í ringasta føri, so hetta mundi vera ringasta føri fyri týskarar.

Og sum seinni hálvleikur leið, so skuldi tað vísa seg, at talan skuldi gerast um eitt heilt óvanligt kvøld fyri føroyskan fótbólt. Í roynd og veru høvdu týskarar bert eina vandamikla roynd seinasta hálva tíman, tá Jákup stórbjargaði einari frísparksroynd frá Hamann úr 20 metrum, og tó at føroyingar ikki skaptu so nógv, so lógu teir framvið.

## Ein ógloymandi uppliving

Og áskoðararnir vendu eisini. Jákup á Borg varð klappaður av vøllinu, tá hann beint undan útskifting sínari hevði krúllað einar tríggjar týskarar niður. Óli Johannesen hevði eina góða langskotsroynd, sum tíverri rakti mitt á Kahn, og so høvdu føroyingarnir stóran møguleika at javna, tá sjey minuttir vóru eftir.

Eitt langt útspæl frá Jákupi Mikkelsen varð longt av John Petersen, og so spenti Hjalgrím avstað. Við bóltinum var 19 ára gamli klaksvíkingurin skjótari enn Jeremies, og tá heimsins besti málverji kom ímóti, tóktist Hjalgrím vera púrasta kaldur. Bólturin varð vippaður framvið Kahn, men ólukkutíð rakti skotið uttaru síðuna á stólpanum.

Hvussu lagið á Niedersachsenstadion hevði verið, um Hjalgrím hevði skorað, er ilt at siga, men tað er púrasta víst, at føroysku leikararnir ongan tíð fara at gloyma seinastu løturnar á leikvøllinum. Einastu rópini, sum hoyrdust kring vøllin, vóru tey, sum rungaðu til trummurnar hjá Oskari, og tá føroyski bólkurin tveir minuttir fyri leiklok sang tjóðsang okkara, var tøkkin ein rungandi klappsalva frá týsku áskoðarunum.

At tað ikki eydnaðist føroysku leikarunum at skapa ta heilt stóru og óhugsandi sensatiónina, tóktist heldur ikki bila nakað, tá dysturin endaði.

Týsku leikararnir vóru heilsaðir við einum gigantiskum »buuuh«, tá teir ætlaðu at takka áskoðarunum fyri dystin, og so áttu Føroyar tørn. Tey 36.000 fólkini í leikvøllinum reistust øll somul, og klappsalvurnar dundu oman yvir føroysku leikararnar. Við einum hjarta úr gulli og einum einastandi stríðsvilja høvdu teir spælt seg beint inn í týsku hjørtini, sum hendan dagin funnu sær nakrar nýggjar hetjur. Hesar eita ikki Ballack, Kahn ella Klose, men Mikkelsen, Fløtum, á Borg og annað, sum ikki er so vanligt um teirra leiðir.

Takk fyri dreingir. Hatta var ikki bara flott. Hatta var eitt einastandi avrik, sum tit hava alla orsøk at vera ernir um. Tit vunnu eingi stig, men tit vunnu milliónatal av fótbóltshjørtum kring allan heim.

Δ

## Dysturin í tølum

**Týskland-Føroyar 2-1 (1–1)**
Mikudagin 16. oktober 2002 kl. 20.30 á Niedersachsen stadion í Hannover
1-0: Michael Ballack br 2.
1–1: Arne Friedrich sjálvmál 45.
2–1: Miroslaw Klose 59.
Dómarakvartett úr Ísrael: Dany Koren, Yosef Benisty, Shmuel Shtaif og Alon Yefet
UEFA umboðsmaður úr Kroatia: Josip Cop
Dómaraeygleiðari Ungarn: Sandor Puhl
39000 áskoðarar
Týskland: 1. Oliver Kahn, liðformaður, Bayern München – 3. Arne Friedrich, Hertha Berlin, 5. Carsten Ramelow Bayer Leverkusen (6. Paul Freier, VFL Bochum, 46.), 4. Christian Wörns, Borussia Dortmund – 10. Bernd Schneider, Bayer Leverkusen, 8. Dietmar Hamann, Liverpool, 16. Jens Jeremias, Bayern München, 13. Michael Ballack, Bayern München, 7. Torsten Frings, Borussia Dortmund – 11. Miroslaw Klose, FC Kaiserlautern 9. Carsten Jancker, Udinese (17. Oliver Neuwille, Bayer Leverkusen, 70.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Jens Lehmann, Borussia Dortmund, 2. Ingo Hertzsce, Hamburger SV, 14. Gerald Ascmoah, Schalke 04, 15. Sebastian Kehl, Borussia Dortmund, 18. Tim Borowski, Werder Bremen
Gult kort: Torsten Frings 66.
Venjari: Rudi Völler
Hjálparvenjarar: Michael Skibbe og Erich Rutemöller
Føroyar: 1. Jákup Mikkelsen, 28/–52, Molde – 4. Pól Thorsteinsson, 25/0, NSÍ 5. Jón Rói Jacobsen, 8/0, HB, 2. Óli Johannesen, 59/1, liðformaður, TB, 3. Jens Kristian Hansen, 44/3, B36 – 9. Jákup á Borg, 24/0, B36 (18. Hjalgrím Elttør, 3/0, KÍ, 71.) 7. Fróði Benjaminsen, 18/1, B68, 8. Julian Johnsson, 47/2, B36, 6. Øssur Hansen, 51/2, B68 – 10. John Petersen, 43/3, B36 (14. Helgi L. Petersen, 3/0, NSÍ, 86.) 11. Andrew av Fløtum, 7/0, HB, (15. Christian Høgni Jacobsen, 14/2, Vejle BK 78.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. Jens Martin Knudsen, 56/–143, NSÍ, 12. Hans Fróði Hansen, 23/1, B68, 13. Jóhannis Joensen, 13/0, HB, 75, 17. Rógvi Jacobsen, 18/1
Gult kort: Óli Johannesen, 2., Pól Thorsteinsson, 74
Venjari : Henrik Larsen
Hjálparvenjari: Jógvan Martin Olsen
Lækni: Jens Pauli Marstein
Fysioterapeutur: Øssur Steinhólm
Liðleiðarar: Birgir Hansen og Heðin Askham




*Tá týskarar seinasta hálva tíman royndu at fáa ferð á, vóru føroyingarnir alla tíðina nóg kaldir at gera lítil fríspørk langt uppi á vøllinum, so rútman í týska spælinum varð brotin*